# Eyðun og Andreas altjóða dómarar

**Fríggjadagin fingu teir báðir hondbóltsdómararnir, Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen, at vita, at teir eru blivnir altjóða dómarar**

HONDBÓLTS-DÓMARAR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Andreas F. Hansen og Eyðun Samuelsen fingu fríggjadagin at vita, at teir eru blivnir altjóða dómarar í hondbólti. Væntandi fáa teir sín altjóða "elddóp" einaferð í heyst.*
*Mynd: Bárður*

Tað var í sambandi við venjingardystirnar hjá bæði kvinnu- og manslandsliðnum móti Íslandi herfyri, at teir báðir dómararnir vóru til eitt slag av upptøkuroynd hjá EHF, sum er europeiska hondbóltssambandið. Brøðurnir Hannis og Uni Wardum vóru eisini og royndu seg, men teir hava tó ikki frætt nakað frá EHF enn.

### Sleppa at royna seg í ár

Annar av dómarunum báðum, Eyðun Samuelsen, sigur, at enn vita teir báðir ikki, hvør fyrsta altjóða uppgávan hjá teimum báðum verður.

- Enn hava vit ikki fingið at vita, hvør ið fyrsta altjóða uppgávan verður, men vit vita fyri vist, at vit sleppa at royna okkum í ár, sigur Eyðun Samuelsen.

Mest upplagt er, at teir báðir sleppa at døma ein undandyst í Europa Cup-kappingini, og um so er, verður tað helst einaferð í heyst.

Eitt hugskot var kanska, at føroyska dómaraparið slapp at royna seg í Challenge Trophy Cup kappingini, sum føroyska manslandsliðið skal taka lut í í Írlandi í heyst. Eyðun heldur, at tað hevði verið ógvuliga stuttligt at roynt seg í eini slíkari altjóða kapping. Hann heldur tí, at tað hevði verið eitt gott hugskot, um HSF vendi sær til EHF og bjóðaði teir báðar fram til at døma í kappingini.

### Fer óivað at merkjast

Spurdur um teir báðir nú fara at venja meiri og øðrvísi, enn teir hava gjørt áður, sigur Eyðun Samuelsen:

- Eg vænti ikki, at vit fara at gera meiri við venjing, meðan heimliga kappingin er í gongd, men eg vænti tó, at vit fara at leggja størri dent á fysiska venjing undan kappingarbyrjan, soleiðis at vit eru so væl fyri sum gjørligt, tá ið lagt verður til brots, sigur Eyðun Samuelsen.

At teir báðir nú eru altjóða dómarar, fer uttan iva eisini at merkjast, tá ið teir døma í heimligu kappingini.

- Fólk fara ivaleyst at hava eitt eyka vakið eyga við okkara avrik, og eg vænti, at fólk fara skjótari at finnast okkum, sigur Eyðun.

### Málkunnleikin eisini umráðandi

Teir báðir, Eyðun og Andreas, hava fingið at vita, at tað gekk sera væl hjá teimum í teoretisku royndini í sambandi við at gerast altjóða dómarar. Men tað eru eisini aðrir faktorar, ið spæla inn. Millum annað heldur Eyðun, at tað hevur stóran týdning, at man málsliga er væl fyri. Her er serliga Andreas væl fyri, tí hann tosar flótandi enskt, týskt og franskt. Harumframt klára teir báðir seg eisini væl á teimum skandinavisku málunum.

Teir báðir hava eisini nógv ár fyri sær sum altjóða dómarar, tí aldursmarkið innan hondbóltsdøming er 50 ár, og Andreas, ið er tann eldri av teimum báðum, er einans 38 ár.

# Annað pláss í kúluvarpi

Ingibjørg Poulsen luttók í kúluvarpskapping í Tróndheimi sunnudagin 5. juni, og gjørdist úrslitið eitt 2. pláss við 9,20 m.

Sjálv sigur Ingibjørt, at hon er væl nøgd um avrikið. Ikki minst, nú hon at kalla als ikki hevur vant seinasta hálva annað árið.

Ingibjørg er í Noreg í útbúgvingarørindum, og hetta hevur tikið somikið nógv av tíð, at venjingarnar hava verið sera fáar. Tað hevur so eisini við sær, at hon ikki verður partur av føroyska Oyl-liðnum, sum í ár fer til Hetlands. Annars luttók Ingibjørg fyri gamla felag sítt í Danmark, Aalborg Atletik og Motion, í liðkappingini í elitudeildini í Odense. Hetta var í maimánaði. Har bleiv úrslitið tvey 4. pláss, í kúlu við 9,37 m og hamar við 32,85 m. Tad gav 8 stig til felagið, sum gjørdist nr. 2 í fyrsta innleiðandi umfarinum av DT-kappingini (Danmarks turneringen).

**-jm**

# Um 1000 írar vitja

**Longu sunnudagin byrjaði innrásin av írsku áskoðarunum, sum koma til Føroya at hyggja at dystinum millum Føroyar og Írland mikudagin**

LANDSDYSTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Fjepparanir hjá Sveis vóru nokk so nógvir í tali til dystin leygardagin, men mikukvøldið, tá ið Írland vitjar, verður útlendski parturin av áskoðarafjøldin enn manssterkari, tí ikki færri enn 1.000 írar eru væntandi.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Írsku áskoðararnir fara ivaleyst at seta sín dám á Tórsvølli mikukvøldið. Tá ið vit mánamorgunin fingu orðið á Ísak Mikladal, aðalskrivara í Fótbóltssambandi Føroya, segði hann okkum, at okkurt um 1.000 írar vóru væntandi til dystin.

### Ikki allir hava atgongumerki

Allir hesir mongu írarnir hava tó ikki atgongumerki til dystin, og spurningurin er so, um tað eydnast teimum at ogna sær nøkur av teimum atgongumerkjum, ið FSF fór undir at selja mánamorgunin. Tá vóru sløk 1.000 atgongumerkir eftir, men áhugin fyri teimum var stórur, og lítið man verða at ivast í, at Tórsvøllur verður so at siga fullsettur mikukvøldið, tá ið dysturin verður bríkslaður í gongd.

Írska landsliðið skuldi eftir ætlan koma til Føroyar mánadagin seinnapartin um klokkan fimm við flogfari hjá Atlantsflog beinleiðis úr Dublin, men teir venja ikki fyrr enn týsdagin.

Fyrsta venjingin hjá írska landsliðnum í Føroyum verður týsdagin klokkan tólv á ovara vølli í Gundadali, og mikumorgunin, sjálvan dystardagin, verður vant á Tórsvølli klokkan tíggju. Hesar tíðir skulu tó takast við fyrivarni, tí broytingar kunnu verða gjørdar.